## Graslíki skaðaorsøk

Ikki færri enn 16 av teimum 26 spælarunum í hópinum hjá danska felagnum, AGF, hava í ár verið uttanfyri við smærri og størri skaðum. Fysioterapeuturin í felagnum heldur, at graslíkisvøllurin kann vera orsøkin til skaðarnar. – Nógvir av skaðunum hava verið í baklærinum, og eg haldi hála graslíkisvøllin, vant verður á, vera eina høvuðsorsøk, tí spælararnir glíða illa á vøllinum, sigur Jens Bo Vestergaard við heimasíðuna hjá AGF.



## Button vann í Australia

Taktiskt snildi, tí Jenson Button valdi at skifta til turrveðursdekk áðrenn hinir, tryggjaði honum í gjár sigurin í Formel 1-kappkoyringini í Australia. Sostatt hevur ráðandi heimsmeistarin vunnið fyrsta sigurin fyri nýggja felag sítt, McLaren-Mercedes. Robert Kubica, ið koyrir fyri Renault, var honum næstur, og Ferrari-koyrarin, Felipe Massa, gjørdist nummar trý. Hin maðurin hjá Ferrari, Fernando Alonso, bleiv nummar fýra og er framvegis á odda samanlagt.

# Rannvá og Aksel fáa stuðul

**Bygma Balslev stuðlar nú tveimum spælarum í Havnar Badmintonfelag, Rannvá Djurhuus Carlsson og Aksel Poulsen**




Hilmar Jan Hansen




**Badmintonspælararnir, Aksel Poulsen og Rannvá Djurhuus Carlsson, saman við Alex Hentze frá Bygma Balslev, sum stuðlar teimum báðum**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

– Frammanundan er Bygma Balslev ein stuðul hjá badminton, umframt øðrum ítrótti, men við at stuðla hesum báðum, kunnu vit geva teimum møguleikan at vinna seg fram. Eitt nú kunnu tey koma uttanlands at venja, sigur stjórin í Bygma Balslev, Bent á Lava, ið sjálvur hevur verið virkin badmintonspælari.

– Vit síggja, at eitt gott ungdómsarbeiði verður gjørt í Havnar Badmintonfelag, tí her er framgongd í, og tað eru øgiliga nógv, sum eru farin at spæla badminton, sigur hann.

Stuðulin kemur eisini væl við hjá teimum báðum badmintonspælarunum, ið síggja fyri sær, at hann kann geva nýggjar møguleikar.

– Nú hevur man okkurt annað at kempa fyri, tí eitt nú gevur stuðulin møguleika fyri onkrum uttanlandstúri, so tað ber til at menna seg meira, sigur 26 ára gamli Aksel Poulsen.

– Tá vit fara út at spæla aðrastaðni, fáa vit ordiliga at síggja, hvussu góð vit eru. Her spæla vit ímóti teimum somu alla tíðina, og tá verður tað meira soleiðis, at tú bara fert inn í eina rútmu, tí tað er tað sama alla tíðina. Tá gert tú tað sama alla tíðina og stendur í stað.

14 ára gamla Rannvá Djurhuus Carlsson er eitt av hesum fjølbroyttu ítróttarfólkunum, ið kann gera seg galdandi millum tey bestu í fleiri ítróttargreinum, men hon sigur, at nú hevur hon valt.

– Nú satsi eg upp á badminton, og hesin stuðulin kann hjálpa mær til kappingar uttanlands og sorðið, so tað kemur væl við, sigur Rannvá, sum gleðir seg til Senta FM í ítróttarhøllini á Hálsi mitt í apríl.

– Vónandi gongur tað væl, og tað hevur í øllum førum gingist væl hjá mær í Grand Prix-kappingunum í vetur.

# Bogaskjúttar tak yvir høvdið

**Í sambandi við útbyggingina av flogvøllinum skal ein høll hjá 62°N takast niður, og nú hevur felagið valt at givið bogaskjótifelagnum, VágaSkoti, høllina fyri einki**




Hilmar Jan Hansen

– Vit skuldu allíkavæl fáa hesa høllina burtur, tí hon stendur í vegin, nú flogvøllurin skal byggjast út, so okkum passaði tað sera væl, at vit kundu fáa høllina burtur, samstundis sum hon kundi koma ítróttinum til góðar, sigur Kent Christensen, stjóri í 62°N, tá hann leygardagin avhendaði høllina.

– Eg skilji á lagnum, at tað kemur væl við hjá VágaSkoti at fáa høllina, so nú kunnu vit kanska siga, at privata vinnulívið hevur hjálpt teimum í gongd við tí, og so er restin upp til kommunalu myndugleikarnar.

Høllin verður í næstum tikin niður, men enn er ikki greitt, hvar hon verður sett upp, tí enn er einki grundstykki fingið til vega. VágaSkot hevur vent sær til bæði Sørvágs og Vága kommunu um at fáa eitt stykki at seta høllina á, men hetta er alt so nýtt, at einki ítøkiligt er hesum viðvíkjandi enn.

### Sera takksamir

Formaðurin í VágaSkoti, Tórfinn Hansen, er sera fegin um, at 62°N á henda hátt hjálpir felagnum at fáa tak yvir høvdið, samstundis sum høllin kann koma samlaðu bogaskjótingini í landinum til góðar.

– Vit taka høllina niður og goyma alt tilfarið í einari 40 fóts bingju. Av tí at nógvir av okkum í felagnum eru handverkarar og hava neyðugu amboðini, vænta vit, at tað arbeiði kann ganga skjótt, sigur Tórfinn.

– Høllin kostar okkum einki, so vit eru 62°N sera takksamir fyri, tí hetta er fantastiska flott og kemur at geva okkum umstøður, vit annars ikki høvdu havt møguleika at fingið.

Talan er um eina høll, sum er 27,5 metrar ferðir 13,5 metrar, so hon er í støðd sera væl egnað til bogaskjóting, har longstu innandura breytirnar eru 18 metrar. Harumframt fær VágaSkot pláss fyri umleið 100 fermetrum av øðrum hølum í høllini.

### Stóran týdning

Eisini Schandorff Vang, formaður í Bogaskjótideild Føroya, fegnast um stórfingnu gávuna frá 62°N.

– Vit hava í mong ár tosað um, at vit áttu at bygt eina skjótihøll við øllum hentleikum, sum skuldi verða ein høll, ið minnir um testhallirnar, størstu framleiðarar innan bogaskjótútgerð og størstu handlar hava, sigur hann.

– Men tað er ikki komið longur enn til tankan, tí hetta hevur verið alt ov kostnaðarmikið fyri so lítla ítrótt sum bogaskjóting. Hetta kemur at hava stóran týdning fyri menningina og samanhaldið – ikki bara í



**Tórfinn Hansen, formaður í VágaSkoti, og Kent Christensen, stjóri í 62°N, avmyndaðir leygardagin við høllini í baksýni**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir